# Uttanríkis-og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 3. desember 2020 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | TH/MH |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Kunngerð
um
stuðul til gransking**

Við heimild í § 11, stk. 3, og § 17, stk. 2 í løgtingslóg nr. 89 frá 7. juni 2020 um ráðgeving og stuðul til gransking, menning og nýskapan verður ásett:

**§ 1.** Sett verður á stovn stuðulsskipan, ið veitir stuðul til gransking.
*Stk. 2.* Stuðul til gransking kann verða játtaður, tá ið granskingin verður:
1) framd av føroyskum granskara ella
2) framd í samstarvi við føroyskan granskingarstovn ella
3) mett at hava samfelagsligan týdning fyri Føroyar.
*Stk. 3.* Stuðulsskipanin skal vera virkin fyri, at granskingarførleikin mennist, eitt nú við at stuðla ph.d. lestri og øðrum vísindaligum útbúgvingum eftir kandidatstig.
*Stk. 4.* Stuðulsskipanin skal skapa neyðugu fyritreytirnar fyri gransking og menning - bæði viðvíkjandi útvegan av tilfari, og tá tað snýr seg um at menna fysiska og tøkniliga umhvørvið.

**§ 2.** Stuðulsskipanin fær árliga játtan á løgtingsfíggjarlógini.

**§ 3.** Stuðulsskipanin verður stjórnað av faknevnd við fimm limum, ið landsstýrismaðurin velur.
*Stk. 2.* Limirnir í nevndini verða tilnevndir fyri 3 ár og kunnu ikki sita í nevndini longur enn 2 fylgjandi skeið.
*Stk. 3.* Nevndarlimirnir skulu vera granskarar ella vera granskingarkønir.
*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin tilnevnir formannin í nevndini. Nevndin ger starvsskipan fyri stuðulsskipanina, undir hesum hvussu samstarvað verður við Felagsnevndina.

**§ 4.** Faknevndin skal tryggja, at samlaði stuðulin verður hóskandi býttur millum raðfest øki innan gransking, sum ásett av Ráðnum fyri gransking, menning og nýskapan.
*Stk. 2.* Í viðgerð og støðutakan til umsóknir skal nevndin áseta minstamark fyri stuðli til verkætlanir og minstamark fyri, hvussu

nógv má verða fíggjað av øðrum enn stuðulsskipanini.

**§ 5.** Faknevndin kunnar almenningin um møguleikan at søkja um stuðul úr skipanini og skal seta eina freist at lata inn umsóknir.
*Stk. 2.* Nevndin kunnger til hvørji granskingarøki, stuðul verður veittur, sbr. § 4. stk. 1.
*Stk. 3.* Faknevndin hevur eftirlit við, at stuðulin verður nýttur til ætlað endamál.

**§ 6.** Stuðulsskipanin veitir fíggjarligan stuðul til granskingarverkætlanir, sum lúka treytirnar í § 1, stk. 2.
*Stk. 2.* Stuðul verður latin til:
- Ph.d.-verkætlanir
- Post grad. ella post doc. verkætlanir, ið ganga um fleiri ár
- Smærri verkætlanir við styttri tíðarætlan

*Stk.3.* Stuðul kann verða veittur til bæði grundgransking og nýtslugransking.

**§ 7.** Umsóknir um stuðul úr stuðulsskipanini skulu nágreiniliga lýsa ta verkætlan, sum stuðul verður søktur til. Eisini skulu umsóknirnar gjølla lýsa fakliga og vísindaliga førleika umsøkjarans. Umsøkjari skal skjalprógva sín fakliga førleika, fíggjartørv og aðrar viðkomandi upplýsingar, sum eru neyðugar fyri málsviðgerðina í nevndini. Kravdar upplýsingar skulu latast umvegis umsóknarskipan stovnsins.

**§ 8.** Faknevndin skal senda umsóknir um stuðul til serkønar ráðgevarar innan viðkomandi granskingarøki, sum gera ummæli til nevndina, um tað granskingarliga innihaldið í umsóknini er í lagi.

**§ 9.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá 1. januar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, xx. februar 2021

Jenis av Rana
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Skjal 1**

# Heitið á skjalinum